

Skipini hjá WWS eru bygd í Rumenia. Mynd: Leading Seaman Bill Louys

# Lángevararnir hava yvirtikið World Wide Supply

**Jógvan Hugo Gardar**

22.12.2015 - 09:16

Oljan.fo

Kreppan í frálandsvinnuni rakar nú av álvara tey reiðaríini sum sum flóta tyngst í sjónum fíggjarliga.

World Wide Supply (WWS) úr Ulsteinvik í Noregi glapp eigarunum av hondum, sambært Dagens Næringsliv. Hetta er samstundis fyrsta offrið í tí kreppuni sum rakar hesa vinnuna aftaná at oljuprísurin fór at lækka.

Sambært Dagens Næringsliv hava 96 prosent av eigarunum í felagnum góðtikið eitt uppskot frá lángevarunum um at yvirtaka felagið.

Lángevararnir meina at einki virði er eftir í partabrøvunum, men teir hava góðtikið at gjalda 15 milliónir fyri partabrøvini. 65,7 prosent av eigarunum í einum obligasjónsláni uppá eina góða milliard krónur hava bjóða sær at keypa øll partabrøvini í felagnum. Ætlanin er at koyra allar ognirnar í eitt nýtt felag, WWS Recovery.

WWS hevur ein flota uppá seks sokallað PSV-skip, ið øll eru latin reiðarínum í 2013.

At eigararnir í WWS nú noyðast at sleppa skipunum og lata lángevararnar yvirtaka, er helst ikki seinasta dømi vit fara at síggja í frálandsvinnuni, um vit skulu leggja orðini hjá Sturla Henriksen, stjóra í norska reiðarafelagnum, í geyma.

- Fyri meginpartin av frálandsvinnuni tykist framtíðin at fara frá gráum til krunkasvart. Og tíverri er tað nógv sum bendir á at tað ringasta liggur fyri framman, segði Henriksen í eini samrøðu við Dagens Næringsliv leygardagin.